Vikuskiftis Sosialurin


# TÓNASKALDIÐ

Tann 14. apríl gav plátufelagið TUTL út Atlantsløg - 25 fløgur við løgum eftir Regin Dahl. Rithøvundurin Hanus Kamban ummælir verkið.

**SEINNI PARTUR**





UMMÆLI
*Hanus Kamban*

### Dalarne

Venda vit aftur til tekstirnar, so tykist Svøríki av Norðurlondum at vera tað land, sum hevur talað inniligast til Regins tónahjarta. Erik Axel Karlfeldt (1864-1931) var føddur og vaks upp í Dalarne í Miðsvøríki, einum landsparti við djúpum medviti um ætt, mentan og søgu.

Her tók seg tíðliga, frá 12. øld, upp ein vinna grundað á rík kopar-, silvur- og málmnám. Fólksins mentan var sermerkt, frælsishugurin ramur, Engelbrekt Engelbrektsson, sum í 1434 stóð á odda fyri uppreisn móti samveldiskonginum Eiriki av Pommern, var "bergsmann" úr Dalarne, og somuleiðis fór Gustav Vasa, við stuðuli úr Dalarne, undir frælsiskríggið 1521-23 móti Kristiani II. Tann lutherska rørslan festi tíðliga rót í hesum landsparti.

### Karlfeldt

Karlfeldt gav í 1895 út yrkingasavnið *Vildmarks- och kärleksvisor*, í 1898 komu *Fridolins visor* og í 1901 F*ridolins lustgård*. Við hesum verkum kom hann upp í liðið av mætum svenskum nítiársskaldum. Hann var vinmaður við Gustaf Fröding, og Hjalmar Söderberg - annars í lyndi og baksýni púra ólíkur Karlfeldt - fegnaðist sum ummælari um musikalitetin í yrkingum hansara.

Karlfeldt var av søgumedvitnari bóndaætt, men var samstundis lærdur maður, sum kendi seg ryktan við rót upp úr sínum jørðildi. Bóndin yrkir sjáldan um seg sjálvan, ein fyritreyt fyri hansara sjálvskoðan er nettupp ofta eitt ávíst rótloysi. Karlfeldt lýsir við álvarsemi, kæti, sjálvspei og rúsandi dionýsiskari kenslu almúgunnar lív í Dalarne. Kunnleiki til urtir og fólkalív, kensla fyri árstíðanna skiftum og ein ávísur áhugi fyri stjørnuspáfrøði hómast í hansara universi. Høvuðsættin er norðan, høvuðsárstíðin heystið og yvir øllum dagar mánin við rúsandi og døkkari megi.

### Heystsins kongur

Tær yrkingar eftir Karlfeldt, sum Regin Dahl hevur valt at tónaseta, geva okkum eina ríka mynd av hesum svenska universi. Her hitta vit bønarmenn, spælimenn, sjómenn, bøndur og kaminreinsarar. Her eru ólukkuligur kærleiki og kúgaðir húskallar. Tætt samanvovin í hesum yrkta heimi eru náttúra, gróður og sevjumikil erotikkur. Alt hetta kemur á sansaligan og mótsagnaríkan hátt til sjóndar í tí fullkomnu yrkingini "Nattyxne", sum ber navn av einum slag av líragrasi. Í yrkingini hevur blóman fingið døgg - vakurleika og brá av hættisligari ást - frá sjálvari ástargudinduni, Venus ella Afrodite.

Orð sum *tungelnatt* og *tungelfest* í hesi yrking siga eitt sindur um tað serliga málførið í Dalarne, men sipa eisini til mánan sum veldismátt, vit eru her undir tignarstavinum hjá *The White Goddess*. Uppaftur týðiligari sæst hetta í "Månhymn ved Lambertsmässan", ið er ein kvøða til mánan, heystsins kong, hvørs vald rínur við ong og skóg, hav og grøði og kvinnunnar fang, og sum førir skaldið í huganum aftur til "fädernas länder, i sagornas tid".

### Fridolin

Standandi yvir av hesum ríku



*Erik Axel Karlfeldt*

tekstum tykist Regin - eina ferð enn við støði í opinleika og viðkvæmi - at liva seg inn í orðalistina, so at bæði tann demoniski heystmánin og tann elskhugs-hættisliga kápukonan fáa klanglit. Yvir mongum av Karlfeldts tekstum er ein bellmanskur barokkdámur, týðiligur í kvøðuni til Juliu Djuplin, sum tykist vera ein nýggjari útgáva av Ullu Wiinblad. Regins lag til hesa yrking (kent frá fløguni *Tú lýsti*, har vit hoyra svenska sangaran Håkan Hagegård) er ein opinbering av prangandi vakurleikadyrkan.

Somu djúpu lívskenslu hava sangirnir um Fridolin, henda eyðkenda Karlfeldt-figurin, skemtari og álvarsmaður, bóndi og víðfarin, sum talar við "med bönder på böndernas sätt / men med lärde män på latin". Fridolin er eisini spælimaður, dansari og skald, og í yrkingini "Kom i lunden" syngur hann tí ævinligu songdísini hásong:

*Hjältar, stormande kring jorden,*
*sökte fåfängt med sitt svärd*
*lyckan som är denne vorden*
*kamplöst på hans dunkla färd.*

### Schalom Ben-Chorin

Um vit nú sleppa Karlfeldt, so er í einum ummæli sjálvsagt ógjørligt at nema við allar tættir í